Verkfallið harðnar:

# Fara helst at blokera vegirnar

**– Tað eru so nógvir verkfalsbrótarar til arbeiðis, at skal verkfallið virka til fulnar, verða vit helst noydd til at blokera vegirnar, sigur Hans Joensen í Havnar Arbeiðsmannafelag**

VERKFALLIÐ
*Áki Bertholdsen*

Nú er mangt, sum bendir á, at arbeiðarafeløgini í verkfalli eisini fara at blokera vegirnar rundanum Havnina.




*Á Skansabryggjuni í Havn royndi verkfalsvaktir at ansa eftir, at vøra ikki varð útflýggjað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at tíverri eru tað nógv fólk, sum als ikki virða verkfallið og tí verða tey helst noydd at herða tiltøkini.

– Eg vænti, at vit verða noydd at blokera vegirnar fyri at fáa verkfallið at virka til fulnar, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at hann harmar harmast stórliga um, at tað skal verða so galið

– Tað var ongantíð ætlanin at blokera vegirnar, tí endamálið var at raka vanlig fólk minst møguligt.

Hann dugir kortini ikki at síggja aðrar útvegir í løtuni.

– Vit hava stórar trupulleikar av fólki, sum bróta verkfallið.

Hann sigur, at tey annars høvdu væntað, at verkfallið fór at verða rættiliga effektivt, nú Havnin eisini er við í tí.

– Men mínar royndir av hesum verkfallinum eru, at nógva staðni gongur arbeiðið at kalla sum vanligt tí at tað eru so nógv, sum ikki virða verkfallið.

– Tí haldi eg, at tað verður neyðugt at herða verkfallið úti um landið eisini, m.a. við at blokera vegirnar fyri at forða fyri vøruflutningi.

Tað, sum harmar hann mest, er at tað eisini eru limir í øðrum fakfeløgum, sum bróta verkfallið.

– Vit vita, at bæði í timburhandlum, á heilsølum og aðrastaðni, hava fólk tikið verkfalsrakt arbeiðið upp og tí verða nógvar vørur avgreiddar at kalla sum vanligt.

Hann vísir eisini á, at bæði vøruvognar og lastbilar koyra dúgliga við vørum úr Havnini út á bygd.

– Tíverri er virðingin fyri verkfallinum ógvuliga lítil nógva staðni. Og tá ið stuðulin er so lítil, sum hann er, vænti eg at tað verður neyðugt at blokera vegirnar, skal verkfallið fáast at virka til fulnar.

Annars var upprunaligi taktikkurin at forða fyri, at blokera inni í sjálvari Havnini so at vørur ikki sluppu út av goymslunum og sostatt skuldi tað gerast óneyðugt at blokera vegirnar .

Men Hans Joensen ásannar nú, at hetta er miseydnað fyri ein stóran part, tí virðingin fyri verkfallinum er so lítil og at tey tí verða noydd at herða tiltøkini við blokadum uttan fyri Havnina fyri at forða fyri flutningi úr Havn út um landið.

Hann skoytir uppí, at effektivari eitt verkfall er, styttri verður tað. At bróta verkfallið førir bara til eitt og tað er at draga tað út, heldur hann.

### Stórur munur

Hans Joensen sigur annars, at tað er rættiliga stórur munur á, hvussu verkfallið verður virt.

– Summar heilsølur og fyritøkur hava givið starvsfólki greið boð um at virða verkfallið og at akta verkfalsvaktir.

– Hinvegin eru aðrar fyritøkur, sum brúka hvørt høvi at flyta vørur. Hvørja ferð, vit hava givið undantak til okkurt, brúka tey høvi til at fylla vøruvognin við øllum møguligum øðrum vørum.

– Eitt nú hava sjúkrahús, ellis og røktarheim ogaðrir stovnar, fingu undantaksloyvi at fáa matvørur, men hetta misbrúka summar heilsølur til at fylla aðrar vørur í vøruvognarnar í sama viðfangi.

– Hetta hevur so bara gjørt tað, at vit fullkomiliga hava mist álitið á summum heilsølum og fyritøkum, so at tær eru blokeraðar heilt.






Maskinmeistarafelagið:

# Tekur møguliga sínar menn heim



*Óvissa valdar viðvíkjandi maskinmeistarunum, sum arbeiða í el-verkunum hjá SEV. Teir halda seg til ein sáttmála, sum Fíggjarmálastýrið ikki góðkennir, meðan SEV heldur seg til ein annan. Vandi er fyri, at maskinmeistararnir leggja arbeiði niður vegna sáttmálaloysi*

**Hvørki SEV ella Maskinmeistarafelagið hevur tikið stig til at loysa knútin teirra millum, nú Fíggjarmálastýrið ikki góðkennir nýggja sáttmálan. – Vit hava møguleika at taka okkara menn heim, um sáttmálin ikki verður hildin, sigur Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum**

SÁTTMÁLAKNÚTUR
*Stefan í Skorini*

Eingin hevur tikið stig til at loysa trupulleikarnir millum Maskinmeistarafelagið og SEV. SEV sigur, at tað fer aftur til tann gamla sáttmálan, næstu ferð lønir verða goldnar, meðan maskinmeistararnir ikki góðtaka hetta undir nøkrum umstøðum.

– Tað, sum kann henda, er, at um SEV ikki heldur ta avtalaðu lønina, hava vit møguleikan at taka okkara menn til hús, tí so er sáttmálaloysi, sigur Jógvan Nybo.

Hann dugir tó ikki at siga, um hetta verður aktuelt. Avleiðingin er, at streymurin verður slitin um alt landið.

SEV hevur boðað frá, at tað ikki hevur annað val, enn at fara aftur til tann gamla sáttmálan, nú tann nýggi er ikki góðkendur.

Formaður felagsins, Jógvan Nybo, heldur hinvegin, at støðan er avklárað, tí partarnir hava ein sáttmála. Trupulleikin er tó, at SEV ikki hevur ætlanir um at halda hendan sáttmálan.

Hetta kann tykjast heldur løgið, tá Fíggjarmálastýrið vil ikki góðkenna sáttmálan, og SEV sigur, at tað ikki ætlar at gjalda lønir eftir honum, so leingin Karsten Hansen ikki vil góðkenna hann.

– Tá tú undirskrivar ein nýggjan sáttmála, so er tann gamli ikki til longur. Tí kanst tú ikki fara aftur til ein gamlan sáttmála. So kundi man eisini farið aftur til sáttmálan frá 1985, sigur Jógvan Nybo. Hann leggur afturat, at framferðin hjá landsstýrismanninum ikki kann góðtakast, tí hann skerjir samráðingarrættin hjá fakfeløgunum.

Jógvan Nybo sigur, at felagið ikki hevur havt nakað samband við SEV, og at tað ikki hevur nakrar ætlanir um at seta seg í samband við SEV.

Tískil sæst eingin loysn á hesi heldur torskildu trætu millum teir tríggjar partarnar. Um einar tvær vikur skulu lønir gjaldast maskinmonnunum hjá SEV, og tá kemur tað helst til skarpskeringar.

### Takið lógina til eftirtektar

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, mælir Maskinmeistarafelagnum til at fara aftur til samráðingarborðið.

– Teir eiga nú at arbeiða fyri at fáa ein sáttmála, sum kann setast í verk, sigur Karsten Hansen, sum mælir teimum til at fara aftur til samráðingarborðið. Nakað, sum maskinmeistararnir harðliga vísa aftur. Karsten Hansen leggur tó dent á, at Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið ikki hava nakað samband sín ámillum.

Karsten Hansen vísir á, at SEV er ein kommunalur felagsskapur, og at allir lønarsáttmálar, ein slíkur felagsskapur ger, skulu góðkennast av landinum sambært galdandi lógum og reglugerðum. Tá hesin sáttmáli ikki verður góðkendur, má nýggjur sáttmáli skrivast, sigur hann og mælir Maskinmeistarafelagnum til at taka lógina til eftirtektar.

– SEV hevur tikið hesa støðuna til eftirtektar, tí teir meta seg ikki hava heimild at gjalda lønir eftir einum sáttmála, sum ikki er góðkendur av Fíggjarmálastýrinum. Tí kann hesin sáttmálin ikki nýtast, sigur landsstýrismaðurin.

Karsten Hansen ímyndar sær, at løgmaður ella tingmenn fara at kalla tingið saman, um maskinmeistararnir leggja arbeiðið niður.



*Karsten Hansen mælir Maskinmeistarafelagnum til at taka lógina til eftirtektar, tí Fíggjarmálaráðið hevur heimild til ikki at góðkenna lønarsáttmálar*

Herverk í Ósaskúlanum:

# Skaðin ikki uppgjørdur enn

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Enn ber ikki til at siga, hvussu nógvan pening herverkið í skúlanum við Ósánna fer at kosta. Týsdagin ruddaðu fólk framvegis upp, eftir at onkur sunnunáttina hevði tømt eldsløkkjarar í skúlanum.

Serkønir teknikarar skulu kanna øll tey elektronisku tólini fyri at vita, um tey rigga. Tí ganga í øllum førum nakrir dagar, áðrenn tað verður greitt, hvussu stórur skaðin er í krónum og oyrum.

Mánadagin og týsdagin var skúlin stongdur, og skúlastjórin Símin Petur Hjelm vónaði týsmorgunin, tá vit høvdu hann í telefonini, at hann lat uppaftur mikudagin. Uppruddingararbeiðið er tó so umfevnandi, at tað framvegis var ivasamt, um skúlin lat uppaftur sum ætlað. Møguliga sleppa næmingarnir ikki í skúla fyrr enn hósdagin.

# Sinnisbati eftirlýsir bústaðum til sinnisveik

**Felagið hjá sinnisveikum í Føroyum vísir á tørvin á bústaðum til tey sinnisveiku. Núverandi støða kann ikki góðtakast, tí tørvurin er sera stórur**

SINNISVEIK
*Stefan í Skorini*

– Størsta málið fyri framman hjá Sinnisbata er at útvega teimum psykiskt sjúku bíligar íbúðir, so at tey hava ein bústað, eftir at tey eru útskrivað at psykiatrisku deild. Bústaðarmøguleikarnir hjá hesum bólkinum í samfelagnum eru í løtuni ógvuliga vánaligir, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata.

Avleiðingin av vantandi bústaðarmøguleikunum hjá sinnisveikum er, at tey vera verandi á psykiatrisku deild, hóast viðgerðin er liðug. Bústaðarmøguleikarnir hjá teimum sinnisveiku mugu betrast beinanvegin, sigur formaðurin.

Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum Bill Justinussen, legði fram álit á tingi viðvíkjandi heildarpsykiatri í Føroyum, og felagið gleðist um, at man nú hevur ein leist at ganga eftir.

Felagið hevur fyri stuttum ársaðalfund, har støðan hjá teimum sinnisveiku á ymsum økjum lýst. Felagið vísir á, at eisini er tørvur á einum virknishúsi, har sinnisveik, ið ikki eru før fyri at arbeiða, kunnu fáa ein innihaldsríkan gerandisdag. Trupulleikin er, at fleiri teirra einki hava at gera eftir lokna viðgerð.

At enda ger felagið vart við, at enn er eingin samskipari av psykiatriska økinum settur.

– Hetta er ein lyklapersónur fyri okkara viðkomandi, og tað er sera umráðandi, at hetta starvið verður sett beinanvegin, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata.

